## DAGSINS MEINING

# Bíligari vín og pilsnaraøl

Eitt áhugavert hevur tikið seg upp um prísin á víni og pilsnaraøli – tí veikara ølinum. Evnið varð nevnt í Sosialinum í gjár í eini frásøgn frá Restorffs Bryggjarí, sum hevur sent ein nýggjan pilsnara á marknaðinum. Útvarpið hevur harafturat havt evnið frammi í tíðindainnsløgum seinastu dagarnar.

Upprunin er ein frágreiðing frá Rúsdrekkasøluni við einum uppskoti um at broyta ella tillaga avgjaldsskipanina. Frágreiðingin vísir, at føroyingar framvegis drekka meiri av tí sterkara slagnum. Í øðrum londum er gongdin, at fólk drekka meiri av tí veikara víninum.

Rúsdrekkasølan skýtur tí upp at lækka avgjøldini á víni, soleiðis av vín verður væl bíligari. Somuleiðis skal veikara ølið, pilsnaraøl, gerast bíligari. Afturímóti skal avgjaldið á teimum sterkaru sløgunum hækka nakað.

Rúsdrekka- og narkotikaráðið hevur viðgjørt frágreiðingina og mælir til at taka undir við uppskotinum. Málið hevur verið á landsstýrisborðið, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum umhugsar nú málið.

Málið hevur fleiri síður. Ein er, at lóggáva og prísásetingi skal tálma nýtsluni, at fáa fólk at dreka veikaru sløgini. Ein onnur er tann meiri kulturella síðan. Tað at kunna njóta eitt glas av víni ella eina øl uttan at endamálið er ein kenning ella meiri enn tað. Ein onnur síða er matstovu- og ferðavinna. Ikki skerst burtur, at henda síðan hevur týdning, tá fólk meta um og taka støðu til ferðir, ráðstevnir og líknandi.

Tað tykist, at rákið gongur ímóti tí leið, sum Rúsan og Rúsdrekka- og narkotikaráðið mæla til. Vit frættu herfyri, at Danmark fer at lækka avgjøldini, tí tey vóru nógv lægri í Týsklandi. Hetta ger, at danir keypa vín og øl í stórum nøgdum sunnan fyri markið. Og tá Danmark lækkar, má Svøríki fylgja við, boðar svenska stjórnin frá.

Føroyingar, sum ferðast í Danmark, kunnu ikki annað enn ilskast á prísleguna í Føroyum. Í Danmark fáast ofta bæði 3-4 fløskur á tilboði fyri 100 krónur, samstundis sum ein nøkurlunda góð vínfløska kostar einar 70 krónur í Føroyum. Ein pilsnari fæst fyri 3-4 krónur í Danmark. Her liggur hann um átta-níggju krónur!

Rúsdrekkanýstlan er ikki vaksin, síðani vit fingu hálvfría søglu við Rúsdrekkasølu landsins. T eiga vit nú at kunna liberalisera lóggávuna nakað, sum Vinnumálastýrið hevur skotið upp. Eisini eiga vit at umhugsa at lata handlum loyvi at selja pilsnarøl og kanska eisini borðvín. At lækka prísin á pilsnaraøli og víni er ein sjálvfylgja!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Pensiónsmálið – allur bati bøtur, hóast lappaloysnir

**Birgir Mohr**
*Sandi*

Valagn samgongurnar skal fremjast við at lóggeva afturvirkandi?

Samgonguflokkarnir hava lítið annað megnað á eftirlønarøkinum hesi 4 árini, enn at fella uppskotini hjá samgonguni, men nú í tólvta tíma, nú skal egnast. Tó allur bati bøtur.

Tað hevur verið hildið ódámligt at lóggeva afturvirkandi. Tað er ikki minni ódámligt í hesum føri, hvar tað er beint upp undir eitt løgtingsval, har landsstýrið kanska verður skift út. Og tað er sera ódámligt at lóggeva í ótíð og afturvirkandi til aðrar – til dømis kommunurnar – at gjalda.

Tær kommunalu fíggjarætlanirnar eru beint lagdar og góðtiknar av Føroya landsstýri, og løgtingið hevur beint viðtikið fíggjarløgtingslógina fyri 2002 við halli, tí eini var avsett til avdráttir. Hesin framferðarháttur er átaluverdur – tó at ein unnir fólkapensionistunum allan bata.

Tann ovurstóra minkingin av blokkinum hevur læst samgonguna fíggjarliga, hóast gulltíðirnar, sum verið hava. Í despiratión kemur landsstýrið nú við eini lappaloysn til nakrar av pensionistunum – men als ikki til allar – hví?

Partar av uppskotinum eru skilagóðir og kundu longu haft verið lógfestir og við í fíggjarlóg og kommunalu fíggjarætlanum fyri 2002, men landsstýrið var ikki vakið á trivnaðarøkinum.

Men nú lóggevur samgongan soleiðis, at allar 49 kommunurnar og løgtingið skulu til at fremja broytingar á so væl inntøku- sum útreiðsluøkinum við afturvirkandi til 01.01.02 og tað er sera Ódámligur arbeiðsháttur. Tað skilja helst øll – uttan okkara fíggjarmálaráðharri sum skilst?

At hettar so bara er ein lappaloysn fyri nakrar pensionistar, og als ikki nøkur framtíðarloysn á pensiónsøkinum, tað vita øll, sum fylgja við. Tá skal hettar uppskot landsstýrisins betrast munandi í tinginum, áðrenn tað verður viðtikið við 3. viðgerð.

Ein komandi samgonga eftir løgtingsvalið eigur at loysa pensiónsmálið – eftirlønarmálið sum heild, bæði upp á stutt sikt og upp á longri sikt. Tað má skipast ein onnur samgonga eftir løgtingsvalið, sum raðfestir vælferð og lívskvalitet Føroya fólks fremst – langt fram um óverulig tjóðskaparromantisk tiltøk sum »fullveldið her og nú« ið hevur verið aðalmálið hjá sitandi løgtingssamgongu.

Fólkið og tess vælferð fremst. Vónandi fær andstøðan betra fyriliggjandi uppskot landsstýrisins undir tingviðgerðini, so tað verður borðbart og setir allar pensionistar líka fyri lógini.

# Eitt sindur um fólkapensjónina

**Chr. Reinert Petersen**

Tað kann tykjast nokk so óbeskeðið, tá uppskot verður lagt fyri Føroya løgting at veita landsstýrismonnum eina eftirløn upp á kr. 20.000,- um mánaðin og tað enntá við afturvirkandi kraft, nú tað ikki sýnist at verða ráð til at hækka fólkapensjónina.

Nú hevur tó ljóðað, at uppskot er um at hækka fólkapensjónina við kr. 400,- um mánaðin. – Fýra hundrað krónur um mánaðin, tað svarar til umleið 13 krónum um dagin. So verður sagt, at allur bati bøtur.

Hetta minnir um mannin, ið býtti fiskiveiðina á tann hátt, at hann segði, »eg ein stóran, tú ein lítlan, tú ein lítlan, eg ein stóran, eg ein stóran, tú ein lítlan, so er beint«.

Álvara tos, tit fólkavaldu! Hugsi um tey gomlu í samfelagnum, hví ikki lata tey fáa ein virðiligan aldurdóm? Tað sindri tey fáa í fólkapensjón, sum nú er, tað gongur til húsaleigu, elnýtslu, hita, útvarpsgjald og sjónvarps do., trygging, sjúkrakassa, heilivág, tannlækna, skatt, telefongjald og aðrar fastar útreiðslur hvønn mánað, áðrenn tað kemur til mat og klæði. Ein vaksin menniskja skal hava mat fyri einar 100,- kr. um dagin. Tað er umleið kr. 4.000,- um mánaðin. Hví ikki lata fólkapensjónistarnar fáa ein 100 kr. seðil eyka um dagin, soleiðis at tey hava ráð til at eta seg mett hvønn dag? Hví ikki vera eitt sindur »large«.

Tað hevur ongantíð hildið vera nøkur skomm her á landi at hjálpa fólki í neyð, ella at hjálpa einum, ið lítið formár sær.

Havandi í huga, at tað skjótt verður løgtingsval, vil eg heita á tykkum fólkavaldu, um at síggja við vælvild til tey gomlu, ið bert hava fólkapensjónina at líta á.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

ISSN 1010-1411



## VIÐMERKINGAR

# Føroysku tølini aftur til heiðurs og æru

**Eyðun á Borg**
*Á Borg á Argjum*
*tjúgundadag 2002*

Okkurt blað hevur skrivað um talbroytingina, nú føroysku talheitini so spakuliga eru á veg inn aftur í mál okkara.

**Sera stóra undirtøku millum manna**
Ikki skilji eg rættiliga, hví hetta blað heldur undirtøkuna fyri føroysku talheitunum vera avmarkaða. Sjálvur helt eg, at vit bert vóru nøkur fá tandur, ið vildu hava talbroytingina framda, helst minni enn 10%. Rættiliga ovfarin gjørdist eg av tí stóru undirtøkuni á telduportalinum. Tá 2500-3000 høvdu atkvøtt, vóru ikki færri enn 41% fyri føroysku talheitunum og 53% ímóti, 6% vóru í iva. Tá nøkur túsund afturat høvdu atkvøtt, fór undirtøkan eitt sindur niður um tey 40%, men slík undirtøka bendir á, at talan er um sanna fólkafylking, ið vil hava tey føroysku tølini aftur. (Jú, eg veit væl, at slík telduatkvøðugreiðsla ikki er so eftirfarandi, men kanska er hetta kortini ein lítil ábending). At fleiri eru ímóti, er sjálvsagt, tí vani og afturhald liggur jú so djúpt í okkum, og nógv hava helst uppfatað spurningin soleiðis, at vit øll knappliga skulu noyðast at brúka føroysku tølini. Sjálvandi er tað ikki ætlanin.

**Hvør verður so mannagongdin?**
Ætlanin er at hava ein fund, har talfólk, málfólk, fjølmiðlafólk og onnur áhugað kunnu práta um fyrimunir og vansar við talbroytingini. Fólk kunnu sjálvandi brúka donsku tølini, sum tey eru von við, men hinvegin skulu vit eisini geva fólki møguleikan at brúka føroysku tølini.

Nøkur fjølmiðlafólk, og onnur við, eru longu farin at brúka føroysku tølini, og tøkk skulu tey hava fyri tað, men fyri at fáa gongd á eina skiftistíð, er tó eisini neyðugt at taka onkra ítøkiliga avgerð. T.d. hevði tað gjørt stóran mun, um vit kundu fingið Gekkin í SvF og V4 í ÚF at brúkt føroysku tølini. Fyrstu mánaðirnar kundu bæði føroysku og donsku tølini verðið brúkt.

**Føroyskur skúli – føroysk tøl**
Annað stig kundi verið at fingið skúlarnar at lært børnini føroysku tølini, tá børnini koma í skúla. Nú skúlin er vorðin føroyskur, hevði talbroytingin verið ein tignarlig gáva frá føroyska skúlanum til føroysku tjóðina og føroyska málið.

**Føroyska talskipanin einfaldari!**
Endamálið við hesum átaki er sjálvandi at fáa eina greiðari, smidligari og einfaldari talskipan, enn ta stirvnu, rangvørgu talskipan, vit hava í dag. Ikki er neyðugt at vera skúlafólk fyri at skilja, at tað verður lættari hjá skúlabørnum at kunna siga og skriva sjeytifimm (75) – fyrst 7-talið, síðani 5-talið, enn tað marghættliga fimm og hálvfjerðs, har vit fyrst siga 5-talið (tað seinna talið!)

Tjóðarmál
Føroyskt verður skjótt viðurkent sum tjóðarmál. Tá fer tað ikki at søma seg at bróka donsku tølini, sum upprunaliga vórðu kroyst inn á okkum í 19. øld. Tað er heldur ikki nóg gott at hálvføroyska tølini: tretivu til tríti, hálvfjerðs til hálvfjórðs (3½), hálvfemst til hálvfims (4½).

Neyvan fæst betri høvi at fara aftur til føroysku tølini enn hendan tíðin, nú vit júst eru farin inn í nýggja øld og nýtt ártúsund.

# Varaløgmaður í Keisarans nýggju klæðum – ”inden for grundloven og rigsenhedens rammer”

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

**Í frøini um tann fitta Fogh er frøi tjóðveldisleiðarans tað mest undrunarverda – álvarsligari er at hann grundgevur við ósannindum, tá hann skal greiða frá, hvussu tað ber til at vitjan Foghs knappliga hevur flutt okkum ”sjeymílafet nærri fullveldinum”.**

Í tíðindasendingini hjá Útvarpinum týsd. 15. jan. 2001, kl. 18.30 tekur varaløgmaður til beinleiðis ósannindir til tess at fjala útyvir, at Tjóðveldisflokkurin saman við hinum samgonguflokkunum nú fullkomiliga hevur givið seg undir tann gamla stigfyri-stig-politikkin eftir heimastýrislógini -”inden for grundloven og rigsenhedens rammer”, sum tað varð sagt í felagslýsingini frá fundinum millum nýggja danska forsætismálaráðharran og landsstýrið.

Mong hava júst undrast á, at varaløgmaður tók so dýran til í síni frøi um blíðu orðini hjá Fogh Rasmussen á fyrstu ferð hansara í Føroyum. ”Nú eru vit komin sjeymílafet nærri loysingini”, segði varaløgmaður eftir vinsælu orðini hjá Fogh. Mong hava spurt seg sjálvan, hvat tað eru fyri broytingar frá Nyrup til Fogh, sum eru so kollveltandi, at samgongan og serliga tjóðveldisleiðarin eru farnir heilt uppfrá.

Í nevndu tíðindasending var tað júst hetta, sum tíðindakvinnan dyrgdi eftir. M.a. spyr hon soleiðis: ”Kanst tú nevna heilt nágreiniliga hvørji málsøki, vit nú kunnu yvirtaka, sum vit ikki kundu undir Poul Nyrup Rasmussen”?

Varaløgmaður svarar: ”Tað sum eg kann vísa á er fyrst og fremst løgreglu og rættarskipan – tað vóru stórir trupulleikar, tað hava vit nú fingið positiva tilsøgn um. Síðani er tað onnur málsøki, sum ikki eru beinleiðis nevnd í Heimastýrislógini, eitt nú persóns-, familju og arvarætturin. Og tað er loftferðslumál o.a. tílíkt, sum frá undanfarnu stjórn varð sagt, at tað vildi man ikki”.

**Ósannindi varaløgmans kunnu skjalprógvast**
Í sama stutta broti oman fyri eru 3 ósannindir, tí á øllum trimum økjum er ongin broyting hend og støðan hjá hesi stjórnini er tann sama sum hjá undanfarnu stjórn. Hetta kann skjalprógvast:

1) Í tíðindaskrivið frá sjálvum varaløgmanni 26. sept 2001 um samráðingarfund millum varaløgmann og Frank Jensen, táverandi løgmálaráðharra, fegnast hann um at: ”Nú er glið komið á arbeiðið um yvirtøkurnar…Niðurstøðan er: Danska stjórnin er nú sinnað at samstarva um, at løgregla, dómsvald og rættarskipanin koma á føroyskar hendur, og kravið um broytingar í heimastýrislógini eru sleptar”. ”Eitt gjøgnumbrot er fingið í lag...s igur Høgni Hoydal”.
2) Um sama evnið er tíðindaskrivið frá Frank Jensen, løgmálaráðharra, 26.sept. 2001, har m.a. sagt verður: ”Justitsminister Frank Jensen har i dag på et møde med vicelagmand Høgni Hoydal præsenteret regeringens forslag til en samarbejdsproces mellem Færøernes landsstyre og regeringen, som vil gøre det muligt for Færøernes landsstyre og Lagting at overtage politi og retsvæsen samt hertil knyttede sagsområder. Regeringen har foreslået, at der nedsættes en arbejdsgruppe af danske og færøske embedsmænd, som skal udarbejde et oplæg til efterfølgende politisk beslutning. Resultatet af arbejdsgruppens overvejelser skal gøre det muligt at gennemføre lovgivning i 2003.”
3) Í formliga uppskotinum frá danska løgmálaráðnum, dagf. 25.sept. 2001, verður eisini mælt til, at yvirtøkan umframt løgreglu og rættarskipan eisini fevnir um prosess- og revsirætt, og eisini ákæruvaldið og kriminalforsorgina.
4) Í svari uppá fyrispurning úr Føroyum, sum undirritaði hevur fingið innlit í, sigur danska løgmálaráðið 17. des. 2001 (tvs. eftir at nýggja stjórnin hevur tikið við), ”at en overtagelse af person-, familie- og arveret kræver en ændring af hjemmestyreloven....En lovgivning af den nævnte karakter vil i givet fald lovteknisk set kunne gennemføres enten ved en lov om ændring af hjemmestyreloven af 1948 eller ved en særskilt lov om Færøernes overtagelse af visse sagsområder. Det kan endvidere oplyses, at grundlaget for det kommende arbejde mellem danske og færøske embedmænd fremgår af den daværende regerings forslag af 25. sept. 2001.” Um støðuna hjá donsku stjórnini annars vísir man í skrivinum til samskifti millum Frank Jensen og Høgna Hoydal, og at grundarlagið fyri arbeiðinum við hesum yvirtøkum er uppskotið, sum varð sett fram av Frank Jensen á nevnda fundi við Høgna Hoydal.
5) At varaløgmaður eisini sigur ósatt um tað tríðja málið, ”loftferðslumálið o.t.” er ikki neyðugt at gera nakað burtur úr her – tað varð longu skjalprógvað í útvarpinum í gjár av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni.

**Fogh og Hoydal eru samdir - ”inden for grundloven og rigsenhedens rammer”**
Bæði løgmaður og varahava ró uppundir, at við vitjan Fogs er nú semja við donsku stjórnina um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Í nevndu tíðindasending í útvarpinum segði varaløgmaður tað soleiðis: ”Nú váttar hesin forsætismálaráðharrin, at tað er ongin trupulleiki at fremja hesa fullveldisætlanina, sum landsstýrið arbeiðir eftir”.

Men við Dimmu 16. jan. sigur Fogh: ”Vit hava ikki tikið støðu til ætlanina hjá landsstýrinum”. Og enn týðiligari eru orð hansara á fundinum við tingmenn dagin fyri. Har segði forsætismálaráðharrin tað soleiðis:

”Det er regeringens opfattelse, at landsstyrets politik har skiftet spor. Først gik man efter en aftale om oprettelsen af en suveræn stat. Det har man opgivet. Det spor man nu går efter, er en overtagelse af sagsområder inden for grundloven og rigsenhedens rammer, hvor processen ikke har oprettelsen af en selvstændig suveræn stat som endemål. Det er dette vi har bekræftet i fælleserklæringen i dag”. Hetta segði Fogh á fundinum, har 31 tingmenn vóru til staðar. Og hetta er tað, sum Fogh, Kalsberg og Hoydal eru samdir um.

Men sjálvandi – heldur tjóðveldisleiðarin, at hetta má hann vera so himmalsfegin um, so skal ongin nokta honum tað. Fyri onnur tykist hetta at vera løgin sjeymílafet í tjóðveldispolitikki.